# Seismikkskipið »Sea Star« kemur á Havnina í kvøld

Eftir steðgin í Havn fer »Sea Star« til Suðuroyar, har seismiskar upptøkur verða gjørdar við tilknýti til boriholið í Lopra. Í einar tríggjar dagar er ætlanin, at skipið skal sigla nakrar ferðir út og inn eftir Lopransfirði og eisini vestan fyri oynna, inn móti landi og út frá landi. Tá uppstøkurnar í Lopra eru av, fer »Sea Star« undir tær veruligu upptøkurnar á havbotnsøkinum kring Føroyar

PÓL Á KLETTI



»Sea Star« er eitt reytt skip við hvítum yvirbygningi. Ljós og onnur tekin siga frá, at tað hevur skerdar møguleikar at stýra (manøvrera). Seismisku tólini eru sera viðbrekin og kostnaðarmikil, og tað hevur stóran týdning fyri upptøkurnar, at seismiska skipið hevur møguleika at halda seg á støðugari kós við støðugari ferð

Tann 19. apríl samtykti landsstýrið at geva Western Geophysical Corporation loyvi til at gera seismiskar kanningar á føroyska landgrunsøkinum í 1994 og 1995.

Kanningarnar fevna um størsta partin av lýsta landgrunsøkinum innan fyri 200 fjórðingar, og mánadagin kom seismiska skipið »Sea Star« inn á føroyskt sjóøki. Teir fyrstu 3-4 dagarnar er ætlanin at gera seismiskar royndarupptøkur í ein landsynning úr Føroyum. Skipið kemur á Havnina í kvøld.

Í morgin liggur »Sea Star« við bryggju í Havn. Fyrrapartin hevur Western boðið umboðum fyri ymiskar almennar og privatar stovnar og fyritøkur um borð á skipið. Seinnapartin verður høvi hjá almenninginum at vitja umborð og síggja skipið og fáa nærri kunnleika um upptøkurnar, ið gerast skulu.

Eftir steðgin í Havn fer »Sea Star« til Suðuroyar, har seismiskar upptøkur verða gjørdar við tilknýti til boriholið í Lopra. Í einar tríggjar dagar er ætlanin, at skipið skal sigla nakrar ferðir út og inn eftir Lopransfirði og eisini vestan fyri oynna, inn móti landi og út frá landi.

Tá upptøkurnar í Lopra eru av, fer »Sea Star« undir tær veruligu upptøkurnar á havbotnsøkinum kring Føroyar.

### Útgerðin

Henda verkætlan, sum fer fram við størst møguligum fyriliti við fiskastovnin, umhvørvi og fiskiskapin á økinum, fevnir í ár um seismiskar upptøkur eftir siglilinjum, ið samanlagt eru í minsta lagi 7.000 km til longdar. Eftir somu linjum verða haraftrat gjørdar magnetiskar mátingar og tyngdarmátingar.

Meðan upptøkurnar fara fram, sleipar »Sea Star« ymiska útgerð eftir sær í sjónum. Tvey ymisk sløg av útgerð vera í sjónum í senn, ljóðkeldur (ljóðgevarar) og móttøkutól (ljóðmóttakarar).

Ljóðkeldurnar eru settar saman av sonevndum luftkanónum. Seks røðir av luftkanónum eru; tær hanga stutt aftur úr skipinum og røkka einar 50 metrar út til hvørja síðu. Móttøkutólini eru øll í einum 6 kilometra longum kaðali, sum hongur aftur úr skipinum.

Øll útgerðin, ið sleipað verður aftur úr skipinum, er fáar metrar undir sjónum. Móttøkutólini í tí 6 km langa káplinum, eru ikki løtt at fáa eyga á, men ein serlig boya við ljósi og radarrefleksi er fest í endan á kaðalinum.

### Skipið má ikki órógvast óneyðugt

»Sea Star« er eitt reytt skip við hvítum yvirbygningi. Ljós og onnur tekin siga frá, at tað hevur skerdar møguleikar at stýra (manøvrera). Seismisku tólini eru sera viðbrekin og kostnaðarmikil, og tað hevur stóran týdning fyri upptøkurnar, at seismiska skipið hevur møguleika at halda seg á støðugari kós við støðugari ferð.

Tað er tí sera umráðandi, at ansað verur eftir ikki at koma ov nær, so upptøkurnar verða órógvaðar. Skip og bátar, sum arbeiða nærindis seismiska skipinum verða eisini biðin um at hava neyðug ljós og tekin. Trygdarfrástøðan til skipið eigur at vera í minsta lagi 5 fjórðingar aftureftir og 2 fjórðingar frameftir og til síðurnar.

Um borð á seismiska skipinum er ein føroyskur fiskiumboðsmaður. Hann hevur ábyrgd mótvegis Vaktar- og Bjargingartænastuni og hevur sum sína uppgávu millum annað at hava samskifti við skip og bátar nærindis kanningarstaðnum, so at fiskifør og seismikkskip kunnu arbeiða uttan at órógva hvørt annað óneyðugt.

### Upptøkur fyrst eystan og sunnan fyri Føroyar

Tað fyrstu tíðina fer »Sea Star« at gera upptøkur eystan fyri og sunnan fyri Føroyar, men seinni eisini aðrastaðni. Ein meira neyv lýsing um, hvar skipið arbeiðir, verður send gjøgnum Tórshavnar Radio so hvørt.

Seismisku upptøkurnar í ár fara væntandi at vara til nakað út á heystið.

# Ein virkin íslendingur vitjar

Hann var við íslendska trolaranum Neptúnus, tá onkur føroyingur kom beinleiðis umborð, eftir at trolarin »Egill Rauði« var farin á land. Hann fekk tá samband við føroyingar, og hevur síðan bygt upp eitt umfatandi handilssamstarv við føroyingar eins og stóran vinaskara.

GEORG L. PETERSEN

Maðurin er 70 ára gamli Jósafat Hinriksson, stjóri í fyritøkuni J. Hinrikssons Ltd. í Reykjavík. Hetta er fyritøka, sum framleiðir lemmar til trolarar, og í løtuni hevur hann umleið 90% av føroyska marknaðinum, okkurt rækjuskip undantikið.

– Tað var fyri sekstan árum síðan, at samstarvið við føroyingar rættiliga byrjaði, tá eg fekk samband við Mortan Johannesen á Ennibergi. Síðan hevur samstarvið bara vundið upp á seg, sigur Jósafat Hinriksson.

Seinastu átjan árini hevur hann verið ofta á vitjan í Føroyum. Hesaferð var steðgurin ein vika, sum er



Íslendingurin, Jósafat Hinriksson hevur fingið heiðurstekin fyri sítt stóra arbeiði at gera sjóminnis- og smiðjusavn

brúkt til at vitja bæði vinir og onnur, hann hevur handilssamstarv við.

Sum ein av teimum fyrstu, hevði hann eina stóra framsýning í SMS, um somu tíð hann seldi til Mortan Johannesen. Bygningurin á Trapputrøðni var ikki so stórur tá, og stríggið var at fáa allar lutir inn í SMS, greiðir Jósafat frá.

Jósafat Hinriksson fekk fyrstu ferð rættilgt samband við føroyingar, tá hann sigldi við skipinum Neptúnus, sum maskinmeistari. Við hesum skipi var hann í tíggju ár.

Tá íslendski trolarin »Egill Rauði« fórst við Ísland, kom onkur føroyingur umborð á Neptúnus, dagin eftir at skipið fórst, uttan at fara heim, greiðir Jósafat Hinriksson frá.

Tað var ein kaldan januardag í 1955, at »Egill Rauði« rendi á land. Tað frysti 14 stig, og tjúgu tímar gingu, áðrenn fyrsti maðurin varð bjargaður. Fleiri føroyingar vóru við skipinum. 29 mans vórðu bjargaðir hesa náttina. Fimm sjóløtust, harímillum ein føroyingur.

### Sjóminnis- og smiðjusavn

Í fleiri ár gekk Jósafat við ætlanum um at lata upp eitt smiðju- og sjóminnissavn. Í eini 30 ár savnaði hann hann lutir saman, og í 1988 gjørdist dreymurin veruleiki.

Á aðru hædd í verksmiðjubygninginum læt savnið upp í 1988. Tað er 340 fermetrar til støddar, og í dag eru 3000 lutir savnaðir har.

Hann hevur m.a. tveir lutir av gamla Ennibergi, eins og annað forvitnisligt er at síggja. Har er eisini ein gomul smiðja, ið hevur júst somu støđd, sum gamla smiðjan hjá pápa Jósafats. Inni eru fleiri hundrað gamlir smiðjulutir.

Næstseinasta sunnudag fekk Jósafat viðurkennig fyri sítt arbeiði. Tað var »Sjómannadagsráð Reykjavíkur og Hafnarfjarðar«, sum heiðraði Jósafati við eini viðurkenningarplátu.



Jákup Lamhauge, býráðsformaður í Runavík

# Stóru kommunurnar lýða ikki harraboð

PÓL Á KLETTI

Fleiri av teimum stóru kommununum hava samtykt ikki at fylgja harraboðum úr Tinganesi og lækka skattaprosntið.

Ein teirra er Runavíkar kommuna, sum týsdagin einmælt samtykti fyribils ikki at broyta fíggjarætlanina og skattaprosentið í ár.

Jákup Lamhauge, býráðsformaður, sigur, at avgerðin er grundað á serliga trinni viðurskifti.

Í fyrsta lagi skattainntøkuna fyrstu fimm mánaðirnar í ár saman við fyrivarni við reguleringini fyri skattaárið 1993, sum kemur í oktober í ár.

Í øðrum lagi vísir Runavíkar býráð á, at inntøkurnar frá kommunalu havnini hava verið minkandi í seinastuni – í takt við minkandi innflutningin.

Og í triðja lagi er tað avtalan við lánistovnarnar um umlegging av kommunalu lánunum við lægri rentu og longri avdráttartíð, sum enn ikki er komin endaliga upp á pláss.

# FORUM 94



Leygardagin 18. juni kl. 16 stundisliga verður fundur í Norðurlandahúsinum fyri allar, sum skulu við á norðurlendsku kvinnuráðsstevnuna í Åbo fyrst í august í ár, upplýsir Forumfyrireikingarbólkurin.

Stjórin í Norðurlandahúsinum, sum sjálvur er finnlendingur, fer at fortelja okkum um Finnland og vísa myndir haðani.

Greitt verður eisini frá teimum ymisku evnunum, vit hava við okkum til FORUM.

Tað er umráðandi, at vit allar, sum skulu við á stevnuna, hittast henda dagin. Høvi verður at keypa sær ein drekkamunn og fáa eitt prát.

Praktiskar upplýsingar um ferðina og annað í hesum sambandi verða eisini at fáa henda dagin.

Løtan er okkara – til gamans og álvara.

# Føroyingar vitjan av fólki frá málskúla í Aberdeen

Hjúnini, Perviz og Alex Reid, koma til føroya sunnudagin. Tey fara komandi vikuna at hava almennar, kunnandi fundir um teira málskúla, »Aberdeen Centre for English«, ið er góðkendur av bretsku myndugleikunum.

DIA MIDJORD

Um mánaðarskiftið mars/apríl tók ferðamannadeildin hjá Strandfaraskip Landsins upp samstarv við henda málskúlan í Aberdeen, og nú er avgjørt, at leiðarar skúlans, hjúnini Perviz og Alex Reid, koma hendavegin at kunna føroyingar um henda málskúla.

Tey hava undanfarin ár eisini vitjað fleiri onnur lond, har tey kunna fólkini um teirra skúla. Í fyrra ári vóru tey t.d. í Brasilia, og í fjør vóru tey í Sveits og Eysturríki. Kortini umboðau tey henda túrin allar góðkendu málskúlarnar í Bretlandi.

### 3 kunnandi fundir

Tey koma sunnudagin og longu mánakvøldið fara tey bæði á almennum, kunnandi fundi í Havn at geva føroyingum betri innlit í skúlan, og hvat hesin kann bjóða føroyingum. Týsdagin verður so kunnandi fundur í Klaksvík og mikukvøldið á Tvøroyri.



ngar

Aberdeen Centre for English, har føroyingar kunnu fáa serskeið

Tey bæði hava við sær filmir, plakatir, faldarar og annað, ið vístir verða fram á hesum kunnandi fundum. 2000 málskúlar eru í Bretlandi og hesin er ein av 250, ið er góðkendur av bretsku myndugleikunum.

Tórður Jóansson, ið hevur arbeitt í Aberdeen seinasta árið og kennir væl til skúlan, sigur, at hetta er ein av frægastu málskúlunum sum eru. Hann kennir væl fólkini, ið standa fyri skúlanum, tí hesi hava verið knýtt at universitetinum í Aberdeen, har hann arbeiðir í løtuni.

### Øll kunnu luttaka

Tórður Jóansson leggur dent á, at fólkini í fleiri ár arbeiddu við univeristetið, har tey serliga lærdu útlendingar bretska málið. Og fyri fimm árum síðani stovnaðu tey skúlan »Aberdeen Centre for English«.

– Tað er eingin loyna, at føroyingar á øllum stigum, kunnu læra ein hóp á slíkum málskeiði, ið varir eina ella tvær vikur, sigur Tórður Jóansson.

Og lat tað vera sagt beinanvegin, at ein og hvør kann fara á henda skúlan. Tað er óneyðugt at halda seg aftur, tí ein hevur trupulleikar við tí enska. Leygardag verða øll kannaði í bretska málinum, hvussu stinn tey eru, og mánamorgun eru øll plaseraði á røttu hill.

Skúlin leggur stóran dent á, at lærdómurin ikki bert skal lærast á skúlabeinki. Og tískil verður nógv gjørt við útferðir, vitjanir og annað, ið skeiðlutakararnir ynskja. Tískil koma tey bæði eisini hendavegin, so finnast kann útav, hvat føroyingar eru áhugaðir at síggja og royna.

Strandfaraskip Landsins stendur fyri øllum tí praktiska viðvíkjandi málskúlanum her á landi. Og tað er eisini Strandfaraskip Landsins í skipar fyri góða sambandinum við Aberdeen. Hósdag fyrrapart siglir Smyril til Aberdeen, har hann er fríggjadag seinnapart.

# Bílig Hetlandsferð í august

Hetlendsk ítróttarfólk hava leigað flogfar til Føroyar og steðga her í eina viku.

BEATE L. JENSEN

Tíverri mugu vit sanna, at einki rutusamband er millum Føroyar og Hetlands.

Fyri tíggju árum síðani byrjaði *Norröna* at sigla til Hetlands. Tá hon helt uppat, tók Smyril hesa rutuna upp, men í ár er einki samband tann vegin.

Føroyskt/Hetlendskt Vinafelag hevur gjørt eitt stórt arbeiði fyri at fáa gongd aftur í rutuna, men tað letur seg illa gera, tí tað er so kostnaðarmikið.

Í Hetlandi hava tey ikki ligið á tí løtu síðuni. Fleiri ítróttarfeløg hava tikið seg saman og hava leigað eitt flogfar, ið tekur 30 ferðandi. Tað fer at gera tvær ferðir til Føroyar, hina fyrru 8. august og hina seinnu 15. august.

### Flogfarið fyllast

Hetlendsku ítróttarfeløgini, sum tikið hava stig til ferðina loftvegis til Føroyar, eru Bogaskjótifelagið, leirdúgvuskjótarar, svimjarar, nakrir rógvarar og fótbóltsleikarar.

Tað, sum umrædur hjá teimum, er at fáa fylt flogfarið upp á ferðunum niður aftur til Hetlands, og merkir hetta, at Føroyskt/Hetlendskt Vinafelag hevur hópin av ferðaseðlum til Hetlands 8. august og aftur úr Hetlandi 15. august. Ferðaseðlarnir kosta uml. kr. 1800,- báðar vegir.

Føroyska felagið kann hjálpa til við at útvega innivist, eisini um onkur skúlaflokkur ella bindiklubbur hevur hug at gera eina slíka ferð.

### Fráboðast nú

Treytin er, at boðast má frá í hesi vikuni á tlf. 14031.

Um flogfarið verður fullsett báðar vegir, kann ferðin gerast munin bíligari, verður upplýst.

Í tíðarskeiðinum 8. til 15. august verða nógv tiltøk í Hetlandi so sum útferðir, veitslur o.a. Høvi verður hjá føroyingum at síggja nógv meiri til gerandislívið hjá hetlendingum enn annars.

# Norðurlendskir universitetsstjórar hittast í Føroyum

Í døgunum 18.-23. juni verður ráðstevna og ársfundur á Hotel Føroyum fyri universitetsstjórar úr øllum Norðurlondum. Hetta er nítjanda ráðstevnan av sínum slag innan norðurlendska samstarvið millum universitetsfyrisitarar, stytt NUAS.

Fyrsta ráðstevnan varð hildin í Noregi í 1976, og síðani hava stevnurnar skiftst millum londini. Hetta er aðru ferð, Fróðskaparsetur Føroya er vertur. Fyrru ferð var í 1984, at setrið kom upp í samstarvið. Í løtuni eru umleið 60 lærdir háskúlar limir í samstarvinum.

Luttakaratalið hesa ferð er eitt tað mesta, sum verið hevur. Útlendsku gestirnir eru ikki færri enn 70 í tali, av teimum 54 ráðstevnuluttakarar: 12 úr Danmark, 18 úr Finnlandi, ein úr Grønlandi, ein úr Íslandi, 8 úr Noregi, 13 úr Svøríki umframt eitt serliga innboðið umboð úr Skotlandi.

Í stýrisbólkinum fyri samstarvið sita tveir universitetsstjórar fyri hvørt av teimum fýra størru Norðurlondunum, Ísland, Grønland og Føroyar hava fyribils eygleiðarastøðu. Formaðurin í samstarvinum er í løtuni Roger Broo á Åbo Akademi, har eisini sekretariatið er. Aðalskrivari er Anna-Stina Nyby.

Hesi seinastu 10 árini er fyrisitarasamstarvið víðkað við ráðleggingarbólkum. Teir eru nú vorðnir 9 í tali, fyri m.a. lestrarvegleiðing, javngilding av prógvum, starvsfólkafyrisiting, informatión. Um somu tíð er íkomið eitt vaksandi samstarv við norðurlendska ráðharraráðið.

Høvuðsevnið á ráðstevnuni í Føroyum verður eitt framhald av tí, sum tikið varð til umrøðu í fyrrárið í Íslandi og í fjør í Danmark: broytingarnar, sum í seinastuni eru hendar – og skulu henda í stýrisskipanarlógunum fyri lærdu háskúlarnar í Norðurlondum. Hesa ferð verður denturin lagdur á praktisku avleiðingarnar fyri fyrisitingina, og harvið eisini arbeiðsbýtið millum rektara, stjóra og stýri. Eitt annað evni er fígging av universitetsvirksemi. Hetta verður upplegg til næstu ráðstevnu, sum verður í Lund.

Gestirnir fáa eisini høvi til at hyggja seg um, og ikki einans í Havnini. Á skránni eru m.a. útferðir norður á Viðareiði, til Kirkjubøar og – um viðrar – undir Vestmannabjørgini.